Færri koyra við kenning í Havn

síða 7

tíðinda
sosialurin
blaðið

7,-

Nr. 193 ★ týsdagur 11. oktober 1994

# British Petroleum bert fimm kilometrar frá okkara sjóøki:



Press and Journal

‘Stunning’ oil find raises boom hopes

Shetland gushers excite experts

# Olja rennur undan okkara fiski-marki

síða 4



Hilmar Jan Hansen

GLASGOW



Jan Müller

ABERDEEN

# Okkara menn í Skotlandi

Sosialurin verður við til landsdystin millum Føroyar og Skotland mikudagin og vit luttaka eisini á oljuráðstevnuni í Aberdeen. Tilfar úr Skotlandi í komandi bløðum

## Eins nógvar kvinnur og menn í arbeiði í Stavanger í 1997

síða 5

*Stórtíðindi um vikuskiftið*

# Risastór oljukelda funnin undir føroyska markinum

***Bert tríggjar fjórðingar, elle 5,5 kilometrar frá føroyska markinum hevur British Petroleum funnið eina risastóra oljukeldu***



*Jan Müller*

**ABERDEEN**

Nú er olja funnin so tætt at føroyska fiskimarkinum, at ongi ivi er um, partar av tí olju, sum er í hesi oljukeldu kemur frá føroysku undirgrundini, ella liggur í hvussu er har sum føroyska fiskimarkið gongur. Seinasta risastóra oljukeldan sum BP hevur funnið liggur bert tríggjar fjórðinar ella 5,5 kilometur frá føroyska fiskimarkinum. Hesin teinur er ikki longur enn millum Skálabotn og Skipanes, har eru seks kilometur, ella millum Sund og Hvítanes. Keldan tætt við føroyska fiskimarkið hevur økt áhugan munandi hjá oljufeløgunum fyri føroysku undirgrundini.

Í hesum døgum er oljuráðstevna í skotska oljubýnum Aberdeen og Tíðindablaðið Sosialurin er sjálvandi á staðnum. Blaðstjórin sum luttekur á oljuráðstevnuni, sendi okkum sojóðandi telefax mánamorgunin:

– Bretska oljufelagið BP hevur funnið eina stóra oljukeldu vestanfyri Hetland - hesaferð bert tríggjar fjórðingar frá føroyska fiskimarkinum.

Stóra skotska blaðið »Press and Journal« metir hesi tíðindi vera so áhugaverd, at blaðið kunnger tey yvir alla forsíðuna mánadagin.

Fyri tey umleið 200 fólkini, sum eru við á oljuráðstevnuni her í Aberdeen, koma hesi tíðindi sum ein »bumba«. Á ráðstevnuni verður nettup hetta økið umrøtt.

Skotska blaðið skrivar, at BP helst eisini hevur funnið fleiri aðrar – møguliga seks – oljukeldur stutt frá føroyska markinum.

Eisini eitt annað felag, ARCD, skal hava funnið »black gold« (svart gull) í hesum øki, skrivar blaðið.

Fólk í oljuídnaðinum vilja vera við, at tey nýggju fundini vestan fyri Hetland, eru eins stór og tey størstu oljufundini í Norðsjónum.

Eingi tøl verða nevnd um seinastu oljukelduna, sum BP hevur funnið, men hon sigst at vera sera stór.

Her í Skotlandi eru vónirnar til nýggja oljuøkið millum Hetland og Føroyar sera stórar.

Oljufólk siga, at stóra oljuævintýrið er ikki byrjað enn – tað liggur beint fyri framman – vestan fyri Hetland.

Svartskygnið í oljuídnaðinum, nú goymslurnar í Norðsjónum eru við at tømast, er nú við at vendast til bjartskygni, nú fleiri nýggjar oljukeldur verða funnar vestan fyri Hetland.

Tað er boripallurin »Sonat Rather«, ið hevur gjørt hetta seinasta fundið. Keldan liggur úti í sjálvari »Føroyar-Hetlands« rennuni á 750 metra dýpi.

Talan er um »ultralight« olju. Keldan er 110 fjórðingar frá Hetlandi og 100 fjórðingar úr Føroyum.



Press and Journal

MONDAY OCTOBER 10 1994

# 'Stunning' oil find raises boom hopes

Shetland gushers excite experts

Fish boundary flashpoint?



---

***Nú standa samráðingarnar fyri durum:***

## Fyrstur er ES-sáttmálin

Fleiri fiskivinnusamráðingar standa nú fyri durum. Í hesi vikuni verða samráðingar við ES, og seinni í mánaðinum verða fiskivinnusamráðingar við Baltisku londini. Hesar samráðingar verða í Keypmannahavn.

Um miðjan november skal føroyska samráðingarnevndin hitta íslendingar, og síðst í november verða samráðingar við Russland.

Seinastu fiskivinnusamráðingarnar í ár verða í fyrstu viku av desember, tá føroyingar skulu hitta norðmenn um samráðingarborðið.

tór.-

**BILLUTIR!**

**Vit hava víðkað okk... útboð av eykalutum til bilar og hava nú fleiri útstoyt enn nakrantíð á goymslu.**

***Tað loysir seg altíð at handla við okkum.***

**p/f Esmar Simonsen**

**KAMBSDALUR, Box 79, FR-530 Fuglafjørður**

**Tlf. 44405, Fax. 44629**

tíðindablaðið sosialurin *– er altíð á staðnum*